# Bakkafrost byggir út



*Bakkafrost fer at byggja ein nýggjan bygning á økinum norðan fyri verandi virki. Eitt sindur skal fyllast út, fyri at fáa pláss fyri bygninginum*

*Mynd: Edvard Joensen*

**Bakkafrost á Glyvrum fer at loka alla framleiðsluna á virkinum inni. Útbyggingin fer væntandi í gongd í heyst, men fer helst at vara eini fimm ár ella so**

VINNUMÁL
*Edvard Joensen*

Bakkafrost á Glyvrum er í støðugari menning, og einar tíggju milliónir krónur verða hvørt ár brúktar til útbyggingar. Seinni í ár verður farið undir eina ætlan, sum skal leggja alt virksemið á virkinum undir tak.

Regin Jacobsen, stjóri á Bakkafrost, sigur, at fyrsta stig í byggiætlanini, sum nú verður farið undir, er at byggja ein 1.300 fermetra stóran bygning norðan fyri verandi virki. Hesin nýggi bygningurin fer at standa oman og niðan og verður fastur í verandi bygningum.

Kryvjivirkið hjá Bakkafrost fer at flyta í hendan nýggja bygningin, og har verður so ein kryvjideild burturav. Sum er liggur kryvjivirkið við síðuna av laksaportións framleiðsluni. Tá kryvjingin verður flutt, verður betri pláss til portiónsframleiðsluna, sum tá verður víðkað, sigur Regin Jacobsen.

Hendan útbyggingin, sum væntandi fer at byrja einaferð seint í heyst, er fyrsta stig av trimum í teirri byggiætlanini, sum Bakkafrost skal ígjøgnum.

Annað byggistig verður ein høll aftrat sunnan fyri verandi virki. Hon skal hýsa allari avskiping. Tá tann bygningurin er liðugur, verður øll avskiping, lossing og lasting yvirhøvur eisini gjørd undir taki.

Triðja byggistig umfatar starvsfólkarúmini á virkinum. Eitt nú nýggja matstovu, umklæðingarrúm og tílík rúm, sum arbeiðsfólkið nýtir, sigur Regin Jacobsen, stjóri á Bakkafrost.




*Soleiðis fer Bakkafrost at síggja út, tá alt virksemið er lagt undir tak*

# Nýggj goymsluhøll á Rituvíkarhálsi

**Handilsfyritøkan P/F Klement Petersen í Saltangará fer at byggja nýggja goymsluhøll á ídnaðarøkinum á Rituvíkarhálsi**

VINNUMÁL
*Edvard Joensen*

Tað er vorðið ov trongt í verandi handilsbygningi hjá P/F Klement Petersen í Saltangará, og ikki er gjørligt at byggja út á staðnum. Tí verður farið á ídnaðarøkið á Rituvíkarhálsi at byggja eina goymsluhøll.

Símun Mittún, stjóri í P/F Klement Petersen, sigur, at talan er um eina goymsluhøll í tveimum hæddum, sum hvør verður 1.000 fermetrar til víddar. Hann er einki fyri at nevna nakran prís soleiðis, men sum skilst á honum, verður hann helst meira enn tvær milliónir krónur.

Byrjað verður at reisa høllina í næstu viku, væntar Símun Mittún, og er so ætlanin at klárt skal vera at flyta inn einaferð í summar.

Í fyrsta umfari verður høllin bara innilokað og bjálvað, so hon kann brúkast til goymslu.

Handilin fer framvegis at halda til í verandi bygningi í Saltangará, sigur Símun Mittún, Men hann útilokar als ikki møguleikanum fyri, at alt virksemið verður flutt yvir á Háls einaferð í framtíðini.

– Tað er ikki so langt hjá okkara kundum at koyra eina tríggjar kilometrar aftrat, heldur hann og sipar til, at fólk, sum fara at keypa køk ella hvítvørur koma oftast í bili og mangan langvegis frá kortini.



*Nakað av tilfarinum til nýgju goymsluhøllina er komið at liggja á ídnaðarøkinum á Rituvíkarhálsi*

*Mynd: Edvard Joensen*

Og at handilin eisini verður fluttur kundi okkurt bent á. Símun Mittún sigur, at P/F Klement Petersen hevur játtan upp á at sleppa at byggja eina høll aftrat á ídnaðarøkinum á Rituvíkarhálsi. Men tað verður so ikki beinanveg, sum hann tekur til.

P/F Klement Petersen er ikki einasta fyritøkan, sum ætlandi fer at byggja á ídnaðarøkinum. Av kommunuskrivstovuni verður sagt, at ein vvs fyritøka hevur ætlanir um at byggja har, eins og eini tvey grundstykki eru løgd av til smærri bygningar eisini.

Annars eru góðir møguleikar fyri víðkan av ídnaðarøkinum. Kommunan eigur stórt øki suður frá tí verandi, sum skjótt er at gera klárt.



## POLITIKKUR & SAMFELAG

# Ikki semja í Sjálvstýrisflokki um nýval

SAMGONGUSTEV OG NÝVAL
*Jan Müller*

Úttalilsini hjá forkvinnuni í Sjálvstýrisflokkinum, Helenu Dam á Neystabø í Sosialinum fyri páskir um møguleikan fyri nývali, um stevið í samgonguni ikki batnaði, hava fingið næstformannin í flokkinum, Sámal Petur í Grund uppá bakbeinini. Hann vil í hvussu er ikki sjálvur kennast við sjónarmiðini hjá forkvinnu síni, tí sum hann málber seg: -Hetta hevur als ikki verið viðgjørt í flokkinum, og tí má tað standa fyri hennara egnu rokning.

– Eg kann ikki taka undir við at fara út í eitt nýval nú. Eg skal ikki siga, at tað forkvinnan meldar út við ikki er skilagott. Tí er tað so, at alt flýtur út og flokkarnir í samgonguni ikki kunnu semjast meira, so eigur man at útskriva nýval sigur Sámal Petur í Grund, sum annars ikki heldur, at nakar annað tekur yvir í Tinganesi, nú tað er so stutt eftir av skeiðinum.

Sámal Petur í Grund hevur ikki gloymt, hvussu óheppið tað var at fáa eitt nýval heilt ófyriskipað á vári fyri trimum árum síðani. -Fer man nú aftur í eitt líknandi nýval, har ein nýggj samgonga skal taka sær av fíggjarlóg ol. so verður tað bara ein eins ring støða sum tá. Landsstýrismaðurin heldur ikki, at Sjálvstýrisflokkurin hevði atkvøtt fyri einum nývali nú, um ikki hinir samgonguflokkarnir eisini gjørdu tað.

– Men hví skal forkvinnan í tínum flokki tá fara út og tosa um nýval – er tað bara fyri at markera flokkin?

– Eg veit tað ikki, men eg havi bara hoyrt hetta í pressuni sigur Sámal Petur, sum ikki dylur yvir, at hann gjørdist eitt sindur kløkkur av at síggja hesi úttalilsini hjá forkvinnu síni. – Eg haldi tað er rættiliga drastiskt nú at fara út og rógva uppundir nýval. Hetta er so mín persónliga áskoðan.



*Sámal Petur í Grund ikki samdur við forkvinnu sína um nýval*

# Upplagt við BCD samgongu um flokkarnir fáa meiriluta

**– Bæði í Javnaðarflokkinum og Sambandsflokkinum eru nýggir tónir at hoyra í sjálvstýrismálinum og tað ger, at næstformaðurin í Sjálvstýrisflokkinum ikki útihýsir eina samgongu við BC og D eftir valið.**

LØGTINGSVALIÐ 2001
*Jan Müller*

– Sjálvstýrisflokkurin vil fegin eftir eitt komandi val vera tann, sum framhaldandi hevur leiklutin at byggja brúgv millum høgra og vinstra og aðrar mótsetningar – eins og hann hevur gjørt so leingi. Hetta sigur næstformaðurin í flokkinum Sámal Petur í Grund, nú m.a. seinastu vcljarakanningar hava víst, at flokkurin eftir eitt val aftur kann koma í eina lyklastøðu eins og hann gjørdi eftir seinasta val.

Hann vísir tó á, at flokkurin hevur gjørt eina samgonguavtalu fyri fýra ár, men eftir tað tvs. um eitt ár, stendur flokkurin fullkomiliga fríur. Fær samgongan meiriluta eftir eitt komandi val, so sær landsstýrismaðurin onga orsøk til, at hon ikki kann halda fram, tí hon hevur sett út í kortið fleiri stórmál, ið arbeiðast skal víðari við.

Sámal Petur í Grund heldur tað tó vera sera umráðandi ikki at útiloka nakran samstarvsmøguleika við aðrar flokkar eitt nú Javnaðarflokkin. –Tað hevur verið sagt fleiri ferðir, at vit eftir seinasta val ikki vildu hava Javnaðarflokkin við í eina samgongu. Hetta hevur ongantíð verið uppá tal frá okkara síðu. Tað vóru onnur viðurskifti, sum gjørdu, at verandi samgonga gjørdist veruleiki.

Næstformaðurin í Sjálvstýrisflokkinum heldur annars, at signalini, sum eru komin frá Javnaðarflokkinum í seinastuni, har hann tykist vilja arbeiða seriøst við sjálvstýrismálinum, eru rættiliga positiv. – Tað samstarv, sum eg havi havt við Javnaðarflokkin eitt nú í Rættarnevndini hevur verið sera gott. Út frá hesum kann eg sjálvur bara siga, at Sjálvstýrisflokkurin er opin fyri samstarvi til allar síður.

– Nú nevndi formaðurin í Javnaðarflokkinum í samrøðu við blaðið herfyri, at hann út frá seinastu veljarakanningini fegin sá eina samgongu millum Javnaðarflokkin, Sambandsflokkin og Sjálvstýrisflokkin eftir næsta val. Hvørja meining hevur tú um tað?

– Um tað verður meirilutin eftir valið, so haldi eg tað er upplagt. Men hinvegin stúri eg eitt sindur fyri, hvat verður av málinum um fullveldi. Ikki so nógv fyri Javnaðarflokkinum, men meira fyri Sambandsflokkinum.

Sámal Petur í Grund vísir á, at skal Sambandsflokkurin hava møguleika at gera vart við seg eftir valið tvs. fáa ávirkan, so má hann koma við umborð á sjálvstýrisvognin. – Eg trúgvi heldur ikki, at Javnaðarflokkurin fer at góðtaka samarbeiði við Sambandsflokkin, um ikki flokkurin fer longur á sjálvstýrisleið.

Annars heldur Sámal Petur í Grund, at tað við leiðsluskiftinum í Sambandsflokkinum tykjast at vera nakrir nýggir tónar, sum benda á, at man ynskir broytingar í sambandi við framtíðarstøðu Føroya.

– Nýggja forkvinnan hevur jú sjálv boðað frá, at nú skal flokkurin vera til at tosa við, og hetta má sigast at vera ein upprøtt hond til samstarv eisini við flokkar, sum vilja koma longur á sjálvstýrisleið. Sámal Petur í Grund ivast eisini í, um linjan hjá fyrrverandi formanninum hevði tryggjað Sambandsflokkinum pláss í eini nýggjari samgongu.

www.sosialurin.fo
www.sosialurin.fo

KVASIR
Grundskeið í teldunýtslu
Skeið til tín, ið vil í holt við at nýta teldu
Hetta skeið er smíðað til tín, ið ikki hevur royndir við teldunýtslu frammanundan. Tú lærir fyrst at handfara telduna og síðani at arbeiða við telduforritum og data - eitt nú at goyma og lesa inn aftur.
Eingin forkunnleiki krevst - vit byrja frá grundini
4 x 4 frálærutímar: mán 30-04-2001 . mán 07-05-2001 . mán 14-05-2001 . mán 21-05-2001
Seinnapartsskeið: kl. 13.30-15.30
Kvøldskeið: kl. 19.00-22.00
FARODANE 04-01
SKEIÐSTOVAN KVASIR FARODANE
TLF 320204
http://kvasir.farodane.fo